gult2 cyan2 magenta2 svart2 gult3 cyan3 magenta3 svart3





# Amnesty kvøldseta

TÍÐINDASKRIV

Mánadagin 28. mai eru 40 ár liðin síðani Amnesty International varð sett á stovn. Dagurin verður hátíðarhildin á ymsan hátt í felagsskapinum, eitt nú verður skrúðgonga í London, høvuðsskrivstovan fær navnið eftir stovnaranum Peter Benenson House og ein veitsla verður fyri øllum sjálvbodnum og starvsfólki í Amnesty UK.

Føroya Deild fer eisini at hátíðarhalda dagin. Mánakvøldið 28. mai verður kvøldseta við upplestri, Kári Sverrisson og Arne Carlsen fara at spæla nøkur løg og Halgir W. Poulsen, fyrrverandi formaður, fer at siga nøkur orð.

Kvøldsetan verður í matstovuni á Lærara-skúlanum mánakvøldið kl. 19.30. Allir Amnesty limir, nú- ella fyrrverandi, eru vælkomnir. Tiltakið er ókeypis, men bússurnar standa frammi, um onkur hevur hug at stuðla felagnum.

# Politisk hugmynd í føroyskari søgu

TÍÐINDASKRIV

ALMENNUR FYRILESTUR verður á Fiskirannsóknarstovuni mikukvøldið 23. mai 2001 kl. 20. Andras Mortensen, Ph.D. heldur fyrilestur, ið hann kallar: Politisk hugmynd í Føroyinga søgu.

Andras Mortensen er savnvørður á Føroya Fornminnissavni og granskari á Søgu- og Samfelags-deildini á Fróðskaparsetrinum.

Føroyinga søga er tann elsta og mest umfatandi skrivliga frásøgnin um føroysk viðurskifti í miðøld. Men hvat er hon verd sum søgulig heimild? Gjøgnum árini hevur verið kjakast nógv um hendan spurning, bæði orsakað av, at umstøðurnar í sambandi við uppruna og varðveiting hennara eru torførar at fáa greiði á, og at søguhøvundurin lat frásøgn sína í ein littereran búna, sum ger, at søgufrøðingar hava aftrað seg við at líta á søguliga sannleiksvirðið í henni. Í fyrilestrinum verða hesir spurningar tiknir upp við støði í spurninginum, hvussu søguhøvundurin brúkar tann litterera búnan við atliti at politiskum hugmyndum í samtíð síni.

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!




## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá ið okkara kæri pápi, verfaðir og abbi

**Hans David Matras**
**fyrrverandi lærari, Kirkja**

doyði og varð jarðaður.

Hjartans tøkk til bygdarfólkið á Kirkju fyri hjálpsemi, bæði meðan hann livdi, og nú hann doyði.

Tøkk til Elsu Funding prest fyri hjálp og troystandi orð.

Tøkk til starvsfólkið á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og annars øll, sum hjálptu.

Tøkk fyri heilsanir, blómur, kransar og gávuna til kirkjuna á Kirkju.

Tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara síðsta hvíldarstað.

Fyri tey avvarðandi

**Børnini**



# Økt avlop hjá Maersk Air

**Maersk Air legði í gjár ársroknskapin fyri ár 2000 fram á Hotel Hafnia. Úrslitið var betri enn í 1999**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*

Stjórin í Maersk Air, Ole Dietz, var nøgdur við árið, sum farið er. Roknskapurin vísir eitt avlop upp á 147 milliónir krónur, sum eru 35 milliónir fleiri enn árið fyri. Hetta segði hann, tá hann almannakunngjørdi roknskapin hjá felagnum á Hotel Hafnia týsmorgunin.

Eisini hevur felagið hækkað eginognina um ikki samsvarandi, so út í móti yvirskotinum. Okkurt skuldi jú eisini vera til eigarararnar, sum stjórin tók til.

Eginognin vaks í fjør úr 1.113 milliónum krónur upp í 1.234 miliónir krónur. Samstundis er soliditeturin eisini batnaður. Hann var í 1999 20%, meðan hann í 2000 roknskapinum er 23%.

Ole Dietz vísti á, at talan er um reel tøl. Einki við at broyta roknskaparhátt ella nakað tílíkt. Sami háttur sum í 1999 var nýttur í fjør, segði hann.


*Ole Dietz, stjóri í Maersk Air, er nøgdur við árið*
*Mynd: Jens K. Vang*

Ein av vinnugreinunum hjá Maersk Air hevur í mong ár verið tyrlutænastan. Men hon varð niðurløgd, og tað var eisini orsøkin til at talið á starvsfólkum hjá felagnum lækkaði nakað í fjør.

Ole Ditez, stjóri, segði, tá hann legði roknskapin fram, at ein týðandi partur av yvirskotinum hjá Maersk Air í fjør, kom av sølu av flogførum.

Maersk Air hevur tann politikk, at felagið vil hava so ungan og nútímans flota sum gjørligt. Tí hevur felagið heldur ikki flogførini meira ein eini fýrafimm ár í meðal. Summi styttri.

Ole Dietz segði, at um ársskiftið komandi, fer Maersk Air bara at hava jet flogfør í flotanum. Tá vera øll Fokker propelflogførini seld.

Felagið strembar eftir at hava tey nýggjastu flogførini alla tíðina. Tað vil siga, at tey størru flogførini verða Boeing 737-700. Tað gevur tó ein trupulleika á Føroyarutuni, tí ikki ber til at lasta hesi flogførini optimalt, tá flogið verður hendanveg. Tí verða framvegis nøkur Boeing 737-500 ella Boeing 737-600 í flotanum, um føroyingar ikki leingja flogvøllin, segði Ole Dietz.

Í ársfrágreiðingini sigur leiðslan í Maersk Air um vánirnar fyri 2001, at árið helst verður merkt av øktari uttanríkisferðslu og framhaldandi høgum olju- og dollaraprísum. Men bjartskygni valdar kortini, og felagið fer framhaldandi at arbeiða við at skifta flogførini út.

## Fleiri ferðafólk

**Alt fleiri fólk ferðast við flogfari, vísa tølini hjá Maersk Air. Men talan er um uttanríkisferðsluna, tá tosað verður um øking**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*

Maersk Air hevði eina øking í samlaða ferðafókatalinum í fjør. Men tað var bara uttanríkisflúgvingin, sum gav vøkstur.

Innanríkisflúgvingin í Danmark er minkað munandi, síðan brúgvin um Stóra Belti varð tikin í brúk. So munandi, at Maersk Air hevur lagt rutur niður. Í løtuni verður bara flogið millum Kastrup og Billund og Kastrup og Rønne.

Hinvegin veksur ferðafókatalið á uttanríkisrutunum og á leiguferðunum hjá felagnum.

Tølini frá roknskapinum fyri ár 2000 vísa, at á leiguferðunum hjá Maersk Air vaks ferðafólkatalið úr 797.000 ferðafólkum í 1999 til 832.000 í fjør.

Sama mynstrið er á regluligu uttanríkisrutunum. Í 1999 var ferðafókatalið 854.000, meðan tað í ár 2000 var 952.000.

Viðmerkt varð, at í fjør lat felagið upp ikki færri enn seks nýggjar uttanríkisrutur, sum sjálvandi eiga part í vøkstrinum.

Eisini á Føroyarutuni hevði Maersk Air ein rættiliga markantan vøkstur í ferðafólkatalinum í fjør. Í mun til 1999 ferðaðust 9.500 fólk fleiri við Maersk Air millum Føroyar og Danmark.

Tað er næstan allur tann samalaði vøksturin á rutuni, siga teir hjá Maersk Air.

# Maersk Air heldur út

**Maersk Air er eitt av teimum fáu flogfeløgunum í Norðanlondum, sum enn klárar at standa í móti uppkeypingarpolitikkinum hjá stóru feløgunum**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*

Gongdin í flogferðsluni seinastu tíðina hevur verið undirskot og samanleggingar, har stóru feløgini hava lagt tey smærru undir seg. Men Maersk Air hevur klárað seg væl.

Á tíðindafundi á Hotel Hafnia í gjár varð ársroknskapurin hjá danska flogfelagnum Maersk Air lagdur fram. Bjarne Hansen, nevndarformaður, og Ole Dietz, stjóri í Maersk Air, løgdu roknskapin fram.

Bjarne Hansen, nevndarformaður segði frá gongdini í flogferðsluni sum heild í fjør, at tað var rættiliga tungt at reka flogferðslu. Serliga vóri tveir faktorar, sum ávirkaðu, og sum eisini í ávísan mun sínámilum hingu saman. Tað vóru høgi dollarakursurin og tann ógvuliga høgi oljuprísurin.

Bjarne Hansen ásannaði, at hjá nógvum flogfeløgum hevði høgi prísurin á brennievni gjørt, at tað komu reyð tøl í niðastu røð á roknskapinum. Men hann fegnaðist um, at Maersk Air ikki var millum teirra. Heldur hinvegin var úrslitið betri enn í 1999.

So væl hevði ikki gingið øllum. Hann nevndi eini tvey dømi, har annað felagið hevði eitt undirskot upp á 65 milliónir dollarar, og hitt einar 100 milliónir krónur.

Eitt felag, sum varð nevnt í tosinum um yvir- og undirskot i vinnuni, var Atlantsflog. Og hildið var, at tað var væl atborið, at felagið kláraði at halda eitt yvirksot undir teimum treytum, vinnan arbeiðir undir.

Bjarne Hansen kom eisini inn á rákið í flogferðsluni í dag, har alt meira vanligt tykist vera, at stór feløg keypa smærri feløg. Seinasta dømi, vísti hann á, er at SAS so seint sum í fyrradagin boðaði frá, at felagið hevði keypt stóra norska flogfelagið Braatens.



*Bjarne Hansen, nevndarformaður í Maersk Air, sigur, at Maersk Air er ikki til sølu*
*Mynd: Jens K. Vang*

Spurdur um, hvat Maersk Air fór at gera, um eitt boð kom upp á felagið, svaraði Bjarne Hansen, nevndarformaður í Maersk Air, stutt og kontant:

»Maersk Air er ikke til salg«.

Hann vísti á, at eftir sum hann dugdi at síggja, var lítið eftir av flogfeløgum í Skandinavia uttan fyri SAS.

Í Noreg dugdi hann einki at finna. Í Svøríki eitt og í Danmark eini trý, har av Maersk Air var eitt.

Tá hugsaði hann sjálvandi um londini, har SAS arbeiðir. Tí sjálvandi eru bæði Finair og Icelandair framvegis á flogi.

Umframt er so Grønlandsfly. Men tað felagið hevði heldur ikki nakað gott ár í fjør, og eisini har vísti roknskapurin eitt undirskot.